## TIT SPYRJA VIT SVARA


*Bergur Hanusson, djóralækni*


*Heri Joensen, prestur*


*Heri Krage-steen, sálar-frøðingur*


*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*


*Jens Andre-assen, lækni*


*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsar-haldsfrøðingur*


*Jón Klein Olsen, politistur*


*Jón Krage-steen. Ferðslu-trygd*


*Julianna Næs, pedagogur*


*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*


*Turid Thom-sen, lestrarveg-leiðari*


*Marius Staksberg, málfrøðingur*

SOSIALRÁPGEVIN

### Hvør eigur at fáa hjálp?

Vit eru tvær einligar konur. Vit eiga eina smáttu hvør, og hava bert fólkapensjón og einki annað at liva av.

Onnur bað Almannastovuna um hjálp, og fekk bæði vaskimaskinu og komfýr, sum er goldið av Almannastovuni. Hin bað um hjálp til komfýr og fekk pappír sendandi at fylla út til húsalánsgrunnin at søkja um bjálvingarlán. Men hon segði nei takk. Hvør eigur at fáa hjálp?

*Í juni 1997 komu ymiskar broytingar í gildi viðvíkjandi umsóknum um persónligt ískoyti til húsarhaldstól. Húsalánsgrunnurin kemur í framtíðini at umsita partar av umsóknunum, tvs. umsóknir um hitaketil, oljufýr, oljutanga, kamin, komfýr, vaskimaskinu- og kuldaskáp, vísandi til løgtingslóg nr. 118 frá 18.06.97 um Húsalánsgrunnin og kunngerð nr . 55 frá 28.05.98.*

*Stuðulin til húsarhaldstól verður veittur sum lán og kann hægst verða 30.000 krónur íroknað mvg. Treytin fyri stuðulslán er, at umsøkjarin er njótandi avlamis-, fólka ella einkjupensionistur og býr í egnum húsum ella íbúð.*

*Serlig umsóknarbløð fáast frá Húsalánsgrunninum, Almannastovuni í Havn og øllum økisdeildunum Almannastovurnar á bygd.*

*Torført er at siga, hví málsviðgerðin hevur verið ymisk hjá tykkum báðum, men uttan iva hevur onnur tykkara søkt innan lógarbroytingina og hin aftaná nýggja lógin kom í gildi.*

**Spyrjið serfrøðingarnar**

Hava tit spurningar til serfrøðingarnar, kunnu tit senda teir til:

**Sosialin**
postsmogu 76
110 Tórshavn

ella á fax: 314720
og telduppostadressuna:
spyr@sosialurin.fo

# Landssjúkrahúsið minni skert í summar

**– Vit miða eftir at hava so fáar deildir afturlatnar sum til ber, eisini fyri at minka um avleiðingarnar av afturlatingini. Hinvegin eru afturlatingarnar um somu tíð sum annað virksemi í landinum verður skrúvað niður. Avbjóðingin er at finna tað støðið av virksemi sum ger, at vit ikki renna okkum í trupulleikar, sigur Marin Vang, sjúkraróktarstjóri á Landssjúkrahúsinum**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Turið Kjølbro*


*– Deildirnar á Landssjúkrahúsinum sum taka sjúklingar inn akutt, verða afturlatnar minst møguligt, meðan hinar verða latnar aftur fyri ein part, sigur Marin Vang, sjúkrarøktarstjóri*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Aftur í summar verða fleiri deildir á Landssjúkrahúsinum stongdar, men tó í minni mun í mun til undanfarnu ár. Orsøkin til afturlatingina er kend.

– Stovnurin skal spara og starvsfólk skulu í summarfrí. Við at lata aftur kunnu vit avgreiða frítíðina, avspáking og fyribyrgja upptjening av tímum, tá ið arbeitt verður halgidagar, sigur Marin Vang, sjúkrarøktarstjóri á Landssjúkrahúsinum.

Deildirnar E2 og E3 vóru afturlatnar í nógvar vikur í fjør, men hava opið sum vanligt í ár.

– Orsøkin til at hesar vórðu stongdar so leingi í fjør var, at tað var so trupult at útvega frítíðaravloysarar. Tað er ikki nógv lættari at útvega avloysarar í ár, men hinvegin ber tað ikki til at leggja so nógvar medisinskar sengur niður. Størsti parturin av sjúklingunum á medisinsku deildunum eru fólk, sum eru ógvuliga sjúk, røktarkrevjandi og tey sum koma inn akutt, og tá ber ikki til framman undan at siga, hvussu stórur tørvurin er. Vit miða eftir at hava so fáar deildir afturlatnar sum til ber, eisini fyri at minka um avleiðingarnar av afturlatingini. Hinvegin verða deildirnar latnar aftur um somu tíð sum annað virksemi í landinum verður skrúvað niður í og við, at summarfrítíð er. Avbjóðingin er at finna tað støðið av virksemi sum ger, at vit ikki renna okkum í trupulleikar. Tíðin fer at vísa um vit hava so mikið opið sum tørvurin er. Tað veldst um sjúklinga- og sjúkramynstrið, og summarið er vanliga ikki so hart í so máta - sum til dømis veturin við krímsjúku, influensu, beinbroti og øðrum, sigur Marin Vang.

Afturlatingarnar eru longu byrjaðar. Onnur medisinska deildin B7 hevur longu verið afturlatin í skjótt tvær vikur, og B6 hevur afturlatið í tvær vikur á páskum. B7 og B6 verða skiftivís afturlatnar frá viku 26 til 34, og so aftur í viku 51 og til við fyrstu viku í komandi ári.

Skurðdeildin A3, sum vanliga bert er opin yrkadagar, verður afturlatin í næstu og aðru viku, síðani aftur í summar frá viku 26 til og við viku 33, aftur í heyst í viku 42 og síðani síðst í árinum frá viku 51 til og við fyrstu viku í komandi ári. Í alt 1 3 vikur.

Psykiatriska deild ella deild 1 verður afturlatin á páskum í eina vika. Deild 3 hevur afturlatið frá viku 25 til og við fyrru helvt av viku 29, og deild 5 hevur stongt frá seinnu helvt av viku 29 og til og við viku 33. Deild 1 hevur sum undanfarin ár aftur stongt á jólum í eina viku.

– Endamálið er, at tær akuttu deildirnar eru afturlatnar minst møguligt, men tær meiri kronisku deildirnar verða latnar aftur fyri ein part, sigur Marin Vang.

Í nógv ár hevur staðið á at útvega nóg mikið av avloysarum. Til summar deildir er verri at fáa fólk yvirhøvur enn til aðrar deildir. Lýst hevur verið í føroyskum og donskum bløðum eftir sjúkrasystrum.

– Vit hava fingið fitt av afturmeldingum. Eisini verður ein flokkur av sjúkrasystrum liðugur í summar, sigur Marin Vang.

Er tað ringt at fáa sjúkrasystrar í avloysarastørv, er tað munandi verri at fáa læknar hendan vegin at arbeiða, tó ikki verri á sumri enn restina av árinum.



# Halda konsert fyri frælsum Føroyum

**Eftir páskir verður konsert í Lærara-skúlahøllini við ókeypis atgongd. Endamálið við konsertini er at stuðla upp undir fullveldisstríðið og at sýna fram føroyskan tónleik**

FULLVELDISKONSERT
*John Johannessen*

Fríggjakvøldið 20. apríl verður politisk konsert í Lææraskúlahøllini í Havn.

Konstertin skal vera ein sýnisgluggi fyri føroyskan tónleik, ið virkar eftir teirri grundhugsan, at føroyingar eru serstøk tjóð í heiminum, og at hetta eisini er galdandi innan tónleikaheimin.

Tað eru Jón Tyril úr tónleikabólkinum CLICKHAZE, Jón Joensen úr TÝR og Niels Arge Galán úr 200, ið skipa fyri tiltakinum, ið hevur fingið heitið FREE FØROYAR.

Jón Tyril ásannar, at heitið á konsertini hevur politiskar undirtónar. Men tað er eisini meiningin.

– Við at vísa á ein føroyskan tjóðarsamleika og skipa fyri mentanarligum tiltøkum haldi eg, at stuðlað verður upp undir fullveldisstríðið. Alt sjálvstýrisstríð føroyinga byrjaði jú sum eitt mentanarstríð. Fyri mær eru hesi tingini tengd saman, sigur Jón Tyril.

Bólkarnir, sum verða við á konsertini, eru 200, Týr, Clickhaze, Marigold, Diatribes, Happy, Sámal Ravnsfjall, Teir og Side Effect.

Tríggir av hesum bólkunum eru við í Prix Føroyar finaluni, men Jón Tyril lovar, at teir fara at spæla annað tilfar til konsertina í Læraraskúlahøllini.

– Ætlanin er ikki at kappast við Prix Føroyar, men heldur at geva eitt ískoyti, sigur Jón Tyril.



*20. apríl verður Læraraskúlin karmur um konsert, ið skal stuðla fullveldisstríðnum*


